## DAGSINS MEINING

# Nei til smámál í Landsstýrismálanevndina

Viðhvørt eru mál, ið neyðugt er at fara í landsstýrismálanevndina við. Hesi mál eru, ella rættari sagt eiga at verða, stórmál. Mál, ið eiga at standa ovast á breddanum á einari og hvørjari tíðindasending. Málið um kanning av sjóbjargingarstøðini í samband við Jøkulfell er ivaleyst eitt slíkt mál.

Hinvegin er tað ótrúligt, at ein tinglimur skal koma sær at fara í landstýrismálanevndina við einum máli, um landsstýrið skal sleppa at gera eina sktisu og eitt pappmodell. Eisini er tað ótrúligt, at miðlar ikki hava eina bagatellgrensu fyri hvat ovastu breddar skulu brúkast til.

At Hergeir Nielsen leggur slíkt, sum í ringasta føri kann verða ein umsitingarspurningur, fyri landsstýrismálanevndina, vísir bara hvusu smáir skógvarnir eru, tá tað kemur til vurderingina av arbeiðsuppgávunum hjá tinginum. Kanska er ætlanin hjá tingliminum úr Vági at gera eina lokalpolitiska markering. Hetta ger tað ikki betur, hóast tað má sigast at hava eydnast væl, tí ikki kann tað verða ofta, at ein klaga um eitt pappmodell verður høvuðstíðindi í okkara sjónvarpi.

Tinglimir eiga at verða bevístir um tingsins tign, og lata verða við at brúka landsstýrismálanevndina til markeringar og lokalpolitiskt spæl. Um tinglimir ikki hava nóg nógv álít á landsstýrinum til at lata tað gera eina skitsu og eitt pappmodell uttan samtykt, so eigur tingið at reisa misálit og velja nýtt landsstýri ella seta administratorar ístaðin fyri ministarar.

Ein kritisk andstøða er altíð gott, men máti skal verða við øllum. Fyrr í ár var eitt kjak um talið av fyrispurningum frá Tjóðveldisflokkinum á tingi. Nú sær út sum, at sami flokkur ætlar at fylla landsstýrismálanevndina við smámálum. Vandin er, at tað verður sum við søguni um smádrongin, sum rópti, at úlvurin kemur til stuttleikar. Tá so úlvurin kom, so trúði eingin honum. Hvussu álvarsligt fara úrskurðir úr landsstýrismálanevndini at verða tiknir, um hon dag og dagliga noyðist at taka støðu til smámál, ið verða reist við politiskum gangi sum endamáli?

Tingið eigur at hava ein bagatellgrensu fyri, hvørji mál skulu fyri tingborð. Nýggja stýriskipanarlógin verður oftani yvirtulkað í almennu umsitingini, og spurningurin er, um málið um millumbylgjusendaran ikki er ein avleiðing av hesum. Hvat er tað fyri eitt parlament, ið skal taka støðu til, um eitt radiorør skal keypast ella ikki? Hvar gongur niðara markið? Reservalutir eiga at verða umfataðir av rammujáttanum, har landsstýrið eigur at fáa heimild til at flyta millum konti innan somu rammu. Um tingið skal samtykkja hvønn tann einasta reservalut, og um tingið skal samtykkja hvørja smávegis flyting frá einari konto til eina aðra á einum stovni, so steðgar øll skipanin upp fyrr ella seinni, og spurningurin er, um ikki millumbylgjusendarin er eitt dømi um júst hetta.

Okkara áheitan er, at tingið endurskoðar skipanina, soleiðis, at man fær rammujáttanir, sum man sær aðrastaðni, so vit sleppa undan, at reservalutir til ein sendara gerast tingmál. Í hesum sambandi er løgið, at eingin setur spurnartekin við skipanina, heldur enn aktørarnar í henni.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Hvör trýr "nokk"?

**Thorbjörn Brochs**

Soleiðis eri eg noyddur at spyrja, aftaná at hava lisið tann boðskap, ið onkur afrikanskur trúboðari hevur prædikað niðuri í Danmark. Boðskapurin er, at um tú ikki verður gröddur, tá ið tú biðir Gudi um tað - ella tá ið ein gröðingarmaður biðjur fyri tær - tá er tað tí trúgv tín er ikki nóg "stór". Hesin sami maður hevur verið fleiri ferðir í Danmark, og tá verður hann helst altíð umröddur í tí kristna vikuavísini "**Udfordringen**", sum vit eisini kenna her. Tað er sum so til at skilja, at blaðið ikki vil seta spurnartekin við læru hansara, av tí at tað vil vera eitt blað fyri öll kristin.

Men tað er okkurt í boðskapi hansara, sum kann elva til stórar trupulleikar hjá nógvum. Blaðið endurgevur hann soleiðis: "Hvis Satan ikke kan stoppe din frelse, kan han heller ikke stoppe din helbredelse. Alle bliver helbredt". Blaðið skrivar víðari: "Han har en klippefast tro på, at alle bliver helbredt, hvis de tror". Var hesin boðskapurin ókendur hjá okkum, hevði eg tagt. Aðrastaðni hevur hann tikið mótið frá nógvum, sum hava verið trúgvandi síðani tey vóru börn, og öðrum, sum hava átt trúnna nógv ár. So fáa tey at vita, at tað er vantandi trúgv, sum er orsökin til, at sjúkur teirra ikki verða gröddar. Men hetta er hvörki frá Jesusi ella frá apostlunum.Tað er ein læra, sum menniskjur hava fingið frá aðrastaðni frá.

Eigi eg - ein ólærdur maður - at siga móti einum kendum, afrikanskum trúboðara, sum verður boðin til Danmarkar fleiri ferðir um árið, og sum fyllir samkomuhöllirnar fleiri dagar hvörja ferð? Döm um tað, tá ið tú hevur lisið tey skriftstöð, ið verða víst til.

Paulus hevði eina sannföring, sum vit lesa um í 2.Tim.4,8: "Og nú liggur rættlætiskransurin goymdur til mín, sum Harrin skal geva mær á hinum degi,--" Hesin mikli trúboðarin visti, at Jesus var frelsari hansara, og vit hava nógvar vitnisburðir um trúgv hansara. Men slapp hann undan at vera sjúkur ella at hava brek? Slapp han undan at verða álopin ella dripin? Nei Paulus mátti tola alt hetta.

Hevur nakar sagt tær, at Paulus ikki bað um at verða gröddur? Neyvan, tí vit vita bæði, at hann var sjónveikur og at hann bað um at sleppa av við einum breki, sum hann tó ikki greiddi okkum nærri frá. Men hann segði, hvat svar Gud gav honum. 2. Kor. 12,9 endurgevur svarið soleiðis: "Náði mín er tær nóg mikið; tí at mátturin verður fullkomin í máttloysi." Tá ið Paulus gjördist greiður yvir, at hetta var **Guds vilji**, var tað eisini nokk til at ugga hann. So hvat er treytin fyri, at Gud svarar bönir okkara *samsvarandi okkara vilja*? Fyri at ikki eg sjálvur skal eiga orðini, vil eg vísa til 1. Joh. 5,14: "Og hetta er tað treystið, sum vit hava til hansara, at um vit biðja um okkurt **eftir vilja hansara**, tá hoyrir hann okkum."

Onkur lærir, at hann ið trýr, verður gröddur. Ein annar lærir, at hann ið trýr, verður ríkur. Og tað kann væl henda. Men eitt veit eg fyri vist: Guds orð **lovar**, at hann ið trýr, verður frelstur. Og tað verður eisini hon, ið trýr. Latið okkum tí biðja í Jesusar anda: "Ikki sum eg vil, men sum tú vilt." Tí Gud veit, hvat er best fyri okkum, og Hann skal geva okkum tær signingar, ið gagnar okkum mest. "Og hetta er tað treystið, sum vit hava til hansara"!

# Hvar var Marius Dam ?

**Regin Joensen**

16. mars skuldi lógaruppskot um lækking av avgjaldi á nýggjum motorsúkklum koma fyri Tingið. Eg fór spentur oman at fylgja við viðgerðini av málinum.

Til seinasta Løgtingsval var eitt av lyftum Sambandsfloksins at lække avgjaldið á nýggjum motorsúkklum, so eg helt at nú teir sita í samgongu mundi eingin trupulleiki verða at fáa málið samtykt. So bleiv tíverri ikki. Nú vóru samgongulimir og andstøðulimir brádliga ikki so heitir fyri uppskotinum.Tað tyktist sum at nú var málið toygt út til eftir Fólkatingsvalið, so nú var ikki neyðugt at dyrgja við fleiri gyltum lyftum. Tórbjørn Jacobsen legði fram uppskot um at beina málið aftur í Fíggjarnevndina,somu nevnd sum var samd um at leggja uppskotið fyri Tingið !

So bleiv atkvøtt um uppskotið hjá Tórbjørn. Stóð á jøvnum, fall uppskotið og kundi Tingið sostatt fara undir 2. viðgerð og samtykkja málið. Við atkvøðugreiðsluna vóru 14 atkvøður fyri men bara 13 atkvøður móti at beina málið aftur í Fíggjarnevndina og málið for sostatt aftur í nevnd. Her manglaði ein Sambandsatkvøða ! Menn hugdu runt í salinum, onkur rann út í gongina at hyggja hvar Marius Dam var. Var tað nú so livandi galið at Sambandsflokkurin sjálvur var við til at goyma málið til næsta val ? Eg fekk ikki hetta at passa,tí sambært Kaj Leo Johannesen er eitt púra vist: Sambandflokkurin loypir ikki frá lyftum,ein spaki er ein spaki, ein maður er ein maður og alt hatta har. Men sannleikin var óreingiligur : Her var hvørki spaki, maður ella Marius !

Tá tingfundurin var liðugur, spurdi eg hvar Marius var. Onkur helt at hann var farin til arbeiðis. Til arbeiðis ? Fær hann ikki yvir 30.000 kr. um mánaðin fyri at verða í Tinginum ?

Kanska Marius Dam kann svara mær (eftir arbeiðstíð, sjálvandi !) hví hann ikki var í Løgtinginum tá atkvøðast skuldi um uppskotið.

Gleðiligar MC-Páskir

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.